# Serskeið á Søgu- og Samfelagsdeildini

Í heyst bjóðar deildin undirvísing í hesum skeiðum:

## Føroyskur politikkur

***Lærari:*** *Jógvan Mørkøre, cand.mag*
***Tíð og stað:*** *hósdagar kl. 10.35-12.15 á Sjómansskúlanum*

Endamálið við skeiðnum er at lýsa føroyskan politikk í samanbering við politikk í grannalondum. Dentur verður lagdur á eina stjórnmálafrøðiliga lýsing av politisku stovnunum og flokkunum seinastu øldina, og hvussu hesir eru broyttir, sum umstøðurnar eru broyttar. Í hesum sambandi verður somuleiðis greinað, hvussu politisk mentan og áhugabólkar ávirka gongdina.

## Nationalisma og etnisitetur

***Lærari:*** *Firouz Gaini, cand.scient.anth*
***Tíð og stað:*** *mikudagar kl. 12.45-14.25 á Sjómansskúlanum*

Endamálið við hesum skeiðnum er at viðgera nationalismu og etnisitet í breiðum ástøðiligum og samfelagsligum samanhangi. Høvuðsdenturin verður tó lagdur á eini antropologiskari lýsing av nationalismu: til dømis sum politiska rørslu, sosiala rørslu, samfelagsskipan og ideologi – við samanberandi "cases" úr Føroyum, Evropa og restina av heiminum. Skeiðið roynir at geva teimum lesandi innlit í teimum mest týðandi nationalismu- og etnisitetsteoriunum í samfelagsfrøðini.

## Demokrati sum hugtak og hugsjón

***Lærari:*** *Jóanes N. Dalsgaard, BA (í samstarvi við Jógvan Mørkøre)*
***Tíð og stað:*** *hósdagar kl. 12.45-14.25 á Sjómansskúlanum*

Endamálið við skeiðnum er at varpa ljós á spurningin um demokratiið í gerandisdegnum. Skeiðið lýsir munin ímillum demokrati sum funktionelt valdsbýti, sum tað er kent úr gamla Grikkalandi, og humanistiskt nútíðardemokrati, sum tað er kent m.a. í Norðurlondum. Viðgerðin vil samanbera Føroyar og Norðurlond og tær avbjóðingar, ið liggja fyri framman í sambandi við ætlanina at samtykkja eina grundlóg fyri Føroyar.

## Løgtingssøgan

***Lærari:*** *Hans Andrias Sølvará, cand.mag*
***Tíð og stað:*** *týsdagar kl. 10.35-12.15 á Sjómansskúlanum*

Endamálið við skeiðnum er at lýsa søgu føroyska løgtingsins í einum breiðum søguligum og samfelagsligum samanhangi. Serligur dentur verður lagdur á tíðina aftaná 1852. Støðið verður tikið í bókmentum, sum lýsa innanhýsis skipanir og arbeiðið í Løgtinginum, umframt størri samfelagsligar samanhangir, sum hesi viðurskifti eru tengd at.

## Oljuvinnan - samfelagsligu árinini

***Lærari:*** *Suni á Dalbø, cand.scient.soc*
***Tíð og stað:*** *mikudagar kl. 12.45-14.30 á Sjómansskúlanum*

Endamálið við skeiðnum er at viðgera nøkur samfelagslig lyklaviðurskifti, tá ið talan er um eina nýggja og stóra vinnu, ið ger innrás í einum lítlum samfelag sum tí føroyska. Serligt atlit verður til samanhangin millum val av oljuvinnustrategium og samfelagsligar avleiðingar; herundir eisini, hvørjar broytingar eru sannlíkar við atliti til føroyska mentan og samleika.

Undirvísingin byggir partvís á bókmentir, sum lýsa dømi um tílíkar samfelagsbroytingar í øðrum smásamfeløgum. Harafturat verða evni viðgjørd, sum verða mett at hava serligan týdning fyri føroyska samfelagið. Undirvísingin verður ein blandingur av fyrilestrum, skeiðsluttakara framløgum og bólkaarbeiði.

## Økismenning

***Lærari:*** *Gestur Hovgaard, Ph.D. og Richard Apostle, professari í sosiologi/antropologi*
***Tíð og stað:*** *mikudagar kl. 10.35-12.15 á Sjómansskúlanum*

Hetta skeðið hevur til endamáls at viðgera økismenning í mun til tær broytingar, sum seinastu árini hevur ávirkað og broytt økishugtakið. Perspektivið er føroyskt, europeiskt og framkomni heimurin annars.
Fyrsti triðingurin av skeiðnum er ein gjøgnumgongd av almennum evnum av týdningi fyri vaksandi týdningin, sum økishugtakið hevur fingið. Eitt nú, í hvønn mun vaksandi týdningurin av økishugtakinum hongur saman við einum minkandi týdningi av nationalstatinum. Næsti parturin leggur dent á økispolitikkin í einum Norðureuropeiskum og Norðurlendskum samanhangi. Í seinasta partinum verður dentur lagdur á føroysk viðurskifti, m.a. við støði í nýggjari gransking á økinum. Í hesum partinum verður eisini dentur lagdur á at samantvinna praktisk dømi úr føroyska samfelagnum við teir meiri teoretisku trupulleikar sum fyrsti parturin hevur sett.
Málið er stundum føroyskt, stundum enskt.

## Búskaparfrøði II

***Lærari:*** *Ólavur Christiansen, cand. polit & scient. soc*
***Tíð og stað:*** *týsdagar kl. 12.45-15.15 á Sjómansskúlanum*

Skeiðið endar við munnligari próvtøku við fyrireikingartíð. Møguleiki verður tá eisini at fara upp til próvtøku í búskaparfrøði I svarandi til 7,5 ECTS við einum givnum pensum.

Luttøka í skeiðinum hevur sum fortreyt eitt ávíst grundleggjandi kunnleikastøði í búskaparfrøði. Hinvegin verður eisini farið ígjøgnum tey mest grundleggjandi ástøðini.
Í mikro búskaparfrøði verður høvuðsdentur lagdur á at lýsa fortreytirnar fyri tí neoklassiska ástøðinum, at viðgera í hvønn mun hesar forteytir eru veruleikakendar, og at lýsa ta marknaðarbúskaparligu skipanina í verki.
Í makro búskaparfrøði verður høvuðsdentur lagdur á meginhugtøk og samanhangir í tjóðarroknskapinum, at lýsa tað nýggja neoklassiska (herundir monetaristiska) ástøðisgrundarlagið og tess fortreytir, tað keynesianska ástøðisgrundarlagið og tess fortreytir, og onnur ástøðisgrundarløg við øðrum fortreytum. Harumframt evni sum altjóða búskapur, vísitalsástøði, tilfeingisástøði og búskaparvøkstur, o.a.

**Galdandi fyri øll skeið:**

Tey eru fyrst og fremst ætlaði lesandi, ið eru komin nakað áleiðis í lesnaði við lærdum háskúla, og lidnum kandidatum við áhuga fyri at leggja aftrat vitan síni. Undirvísing og próvtøka er treytað av at nóg nógv tekna seg til skeiðið.
Tey eru uppá 15 dupulttímar tilsamans, ið svarar til 1/4 lestrarár ella 15 ECTS (undantikið "Búskaparfrøði II", ið telur 7,5 ECTS)

Pensum er 1.500 síður (undantikið "Búskaparfrøði II", ið hevur minni pensum) og undirvísingin verður ein blandingur av fyrilestrum og kollokvium. Øll undirvísing verður í alisfrøðisstovuni á Sjómansskúlanum í Havn.
Uppgáva og munnlig framløga í sambandi við undirvísingina telja 1/3 av próvtøkukarakterinum. Skeiðini enda við munnligari próvtøku, ið telur 2/3 av endaliga karakterinum.

**Umsóknarfreistin er 15. august 2001**

Umsóknarbløð fáast við at venda sær til

**Søgu- & samfelagsdeildina,**
J.C. Svabos gøtu 7,
100 Tórshavn,
tlf. 317009.
ssd@setur.fo

## Timburmenn søkjast

til at arbeiða í Noreg, at byrja 1. august. Góð løn.

**FK Smíð**
Tlf. 210609 ella 318090

## Søkt verður eftir framleiðsluleiðara

Vit søkja eftir einum framleiðsluleiðara til mjøldeildina á Havsbrún. Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiði í einum dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur við rúkandi ferð.

**Arbeiðsuppgávur:**
Ábyrgd av framleiðsluni av fiskamjøl og lýsi, herundir ábyrgdina av:
- operatørum og framleiðslustarvsfólkum
- støðugt at optimera framleiðsluna
- at framleiðslutólini eru í góðum standi
- at góðskukrøvini verða hildin
- at menna framleiðslu og góðsku á lidnu vørunum

Vit rokna við at tú hevur
- eina holla, tekniska útbúgving
- kunnleika til maskinur og teldur
- góð samstarvsevni

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 13. august 2001. Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkum.

HAVSBRÚN
**Pf. Havsbrún**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 414400 · Fax 414401
Mail: bep@havsbrun.fo

Søkt verður eftir

## náttarvakti

at byrja skjótast gjørligt.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

Hotel Føroyar
Oyggjavegur
Postboks 3303
110 Tórshavn

innan 16. juli.

Hotel Føroyar ★★★★
Best Western
**Tlf. 317500**

## Uppsetan og skipan av barrum

*Til:*
*Brúdleyp*
*Rundar føðingardagar*
*Starvsfólkaveitslur*
*Ársveitslur*
*Reseptiónir*
*og tílíkt*



*Hans á Lag Sp/f*
*Tlf. 21 93 83*
*hanslag@post.olivant.fo*

*Sosialurin 311820*



# HEILSANIR



**Góða elskaða Katja**
Hjartaliga tillukku á 2 ára føðngardegnum 6. juli. Vit elska teg.
**Ynskja mamma og babba**







**Góða Esther**
Hjartaliga tillukku við teimum hálvt hundrað, vælkomin í klubban (nú eru bara minnir).
**Heilsan bindiklubburin**



Eg eiti Tommy, og mín lívrættur er piparbúffur við piparsós!



Hesin flotti snikkarin gongur nú móti teim 40 árunum. Aldurin sæst ikki á honum. Still going very strong!



»Jú, eg havi eisini verið ungur…«



Ein rættur piparsveinur lesur mentaðan lesnað!



**Góði Tommy!**
Tillukku við teimum 30 árunum. Vit hava samkenslu…
**Heilsan »Pink Panter«**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..................................................................................
..............................................................................................
..............................................................................................
..............................................................................................
..............................................................................................
..............................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ....................................................................
Bústaður: ...............................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:

**Sosialurin**

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**